# Fleiri seismisk feløg vilja sleppa at gera kanningar



*Judith Neish, ein av heimsins bestu innan oljuráðgeving er ráðgevi hjá landsstýrinum, nú gerast skal av, hvør skal gerea forkanningar í undirgrundini. Her er hon saman við Martin Heinesen, jarðfrøðingi og Peter Philip frá fyritøkuni Geco, sum helst er millum umsøkjararnar*




*Kortið vísir tey trý økini, A,B og C, sum skulu kannast. Talan er um tvey loyvi, A og B og aftrat teimum skulu eisini gerast kanningar í C*

Í gjár klokkan 15 var freistin úti at bjóða upp á forkanningar í føroysku undirgrundini. Ein tíma undan "deadline" í gjár hevði oljufyrisitingin fingið fleiri umsóknir, men vit fáa ikki upplýst, hvussu nógvar. Men tað skilst, at áhugin fyri at gera kanningar í føroyskum øki er stórur.

Nú er so spurningurin, hvat tey ymsu feløgini sjálvi hava at bjóða og hvørji tey eru.

Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini sigur, at tey alt fyri eitt fara at viðgera umsóknirnar. Ætlanin er at viðgera tilfarið sera nágreiniliga, men síðani at bera seg skjótt at og gera av, hvat felag ella feløg skulu sleppa í gongd við at kanna føroysku undirgrundina. Miðjað verður móti, at seismisku kanningarnar kunnu byrja longu tíðliga í summar og mett verður, at vit um ikki so nógvar mánaðir eftir tað kunnu hava tær fyrstu uppýsingarnar um undirgrundina.

Oljufyrisitingin brúkar danska granskingarstovnin DGU og amerikanska serfrøðingin Judith Neish sum ráðgevar. Landsstýrið og DGU hava leingi havt eitt samarbeiði og er ætlanin at halda fram við tí, nú tá seismisku kanningarnar byrja av álvara. DGU hevur rættiliga drúgvar royndir í sambandi við at viðgera seismiskt tilfar. Judith Neish, sum er amerikanari, hevur arbeitt í Skotlandi í mong ár fyri eitt nú BP og verður hon mett sum ein av teimum bestu á økinum.

**jan**

## Viðmerking til úttalilsi hjá Árant Olsen fíggjarstjóra hjá TFL

**Viðmerking til úttalilsi hjá Árant Olsen, fíggjarstjóra hjá TFL, í Degi og Viku 17. febr. 94, um at 300–500 kr. í telefonútreiðslu um mánaðin ikki veltir nakað »budget« hjá nøkrum.**

Til hetta kann upplýsast, at bólkar av fólki, sum fáa forsorgarhjálp vegna vinnuloysi, í mesta lagi hava eftir til mat og klæði umleið kr. 650 ella 530 um vikuna ávikavist um tað eru støk ella gift/sambúgvandi.

Viðmerkjast skal her, at stórur partur av teimum, sum fáa forsorgarhjálp vegna vinnuloysi, eru stakir uppihaldarar við einum ella fleiri børnum.

So ein eykaútreiðsla upp á 300–500 kr. um mánaðin veltir lættliga »budgettið« hjá stórum parti av Føroya fólki í dag.

Hetta bert fyri at vísa á, hvussu støðan sær út hjá nógvum.

*18 febr 1994*
**Elsba Olsen**



*Tað verða skip av hesum slagnum, sum um ikki so langa tíð fara at gera seismiskar kanningar við Føroyar. Hetta skipið eigur amerikanska felagið Digicon. Umboð fyri felagið hava verið í Føroyum greitt frá felagnum. Sleppa teir upp í part verður tað hetta skipið, sum fer at gera seismisku kanningarnar. Digicon eigur eisini Arcadian Searcher, sum herfyri gjørdi kanningar nærhendis føroyska marki num.*